# FRAMTÍÐARINNAR FUNDARSTAÐUR

Tak útgangsstøði í lýsingini á plakatini (sæst á seinastu síðu). Tykkara uppgáva er at lýsa tykkara hugskot til ein nýggjan fundarstað í trimum pørtum. Svarið á tann hátt, ið hóvar tykkum best. Tað kann vera í teksti (minst ein, hægst tvær A4-síður), á video ella við myndum. Uppgávan verður loyst í bólkum á 3-5 fólk.

## 1. Svarið teimum trimum høguðsspurningunum hvat, hvussu og hví

### Hvat?

- Hvat er tað fyri fundarstaður, ið tit vilja skapa?
- Hvørji økir halda tit, tað hevur týdning at skapa nýggjar fundarstaðir um? Tit kunu velja nøkur av evnunum herundir ella eitt valfrítt evni, sum tit eru áhugað í. Her eru nøkur uppskot:
    - Sálarliga ella kropsliga vælveru
    - Burðardygg matframleiðsla og -brúk
    - Fundir tvørtur um ættarlið
    - Sunn avriksmentan í skúlanum
    - Tilvitað miðlanýtsla
    - Javnstøða og inklusjón

### Hvussu?

- Hvussu vilja tit hava, at menniskju skulu hittast?
- Hvør skal vitja tykkara fundarstað?
- Hvat skal henda á tykkara fundarstaði? Gevið dømi og lýsið tey tiltøk, sum tit vilja fremja.
- Hava tit brúk fyri samstarvi við onnur fyri at tykkara hugskot skal gerast so gott, sum gjørligt? Hvat kunnu tey koma við?

### Hví?

- Hví hevur tykkara fundarstaður týdning?
- Greiðið frá, hví tørvur er á tykkara fundarstaði. Hvønn týdning kann tykkara fundarstaður fáa fyri fólk, sum búgva í økinum?

## 2. Finnið upp á eitt gott navn til tykkara fundarstað

## 3. Skapið eitt búmerki - logo - til tykkara fundarstað

Sendið tykkara hugskot inn á nordeniskolen.org, tá tit eru klár. Gloymið ikki at viðhefta tykkara búmerki sum mynd og at skriva navnið á tykkara fundarstaði á fílurnar, sum tit senda.

# FRAMTÍÐARINNAR FUNDARSTAÐUR

**Vit leita eftir tykkum, ið vilja skapa framtíðar fundarstaðin!**

Um tit fingu ókeypis atgongd til rúmið ella staðið alt samdøgrið í eitt ár, til dømis, hvat vildu tit so gjørt fyri at fáa fólk at hittast á ein nýggjan hátt?

Vit leita eftir tykkum, ið vilja menna og royna eina verkætlan í einum av okkara hølum. Hava tit eitt spennandi hugskot, sum aldri er roynt av? Ella er kanska okkurt, ið riggar, sum tit vilja hava meira av? Finnast dømir um talgild møtistøð, ið kundu verið gjørd fysisk?

Tykkara hugskot kann vera ein handil, eitt felagsvirksemi, víðkan av einum felagsrúmi ella okkurt heilt annað stað - tit gera av.

Øll hugskot eru kærkomin, vit gleða okkum at síggja tykkara umsókn!

